# ítróttur

Nr. 89 • leygardagur • 10. mai 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

B36-KÍ:

## Undirhald í Gundadali

**B36 er helst favoritturin á pappírinum, men enn hava teir sjáldan livað upp til heitið, og klaksvíkingar eru so smátt um at verða heitir. Og so hava teir eisini tvey stuðlafeløg við sær**

HÁLVFINALA
*Jákup Mørk*

Dystirnir millum KÍ og B36 hava ofta verið roknaðir sum nakað serligt. Kanska einamest, tí tað heilt leingi var fastur siður, at hesi bæði dystaðust á ólavsøku, og seinnu árini er tað eisini onkun tíð komið fyri, at júst hesi bæði hava dystast um sjálvt meistaraheitið.

Soleiðis er tó ikki sunnudagin, men tað ger ikki týdningin av dystinum minni. Finaluplássið í finaludystinum um Løgmanssteypið stendur upp á spæl, og tað er einki at ivast í, at hetta er ein tvídystur, sum báðir partar vilja vinna.

### Nakrir skaðar

Í B36 mundu tey draga andan nakað lættari, nú liðið slapp óskalað av vøllinum á Mølini á Eiði, men hetta kunnu tey tó ikki dúva uppá serliga leingi. Liðið hevur higartil havt stórar trupulleikar við at finna tað spælið fram, sum áskoðararnir rokna av teimum, men nú eru neyvan ráð til at avrik, sum ikki eru heilt nær toppinum.

Liðið varð tó nakað skert eftir dystin á Eiði, tá Heini í Skorini fór haltandi av vøllinum, og hann verður neyvan við sunnudagin. Avloysari hansara, Sonni Johansen, fekk eisini ein snudd mikukvøldið, men hann spældi samfullar 90 minuttir í venjingardysti hóskvøldið, og verður tí ivaleyst við á liðnum.

Hjá KÍ er støðan í løtuni eitt sindur ivasom við fólkinum. Tá vit hóskvøldið høvdu orðið á venjaranum, Jan Joensen, segði hann, at tað í løtuni vóru fleiri ivamál.

- Ove Nysted verður so ikki við, tí hann er leikbannaður, og so eru eisini ivamál um Alexander Djordjevic og Arnold Joensen. Alexander var tó ein rennitúr í kvøld, men Arnold hevur so ikki vant alla vikuna, sigur Jan.

Tað bendir í øllum førum á, at broytingar mugu gerast á liðnum. Alexander og Ove hava í flestum førum mannað miðverjuna, sum uttan iva fær ein týðandi leiklut í dystinum, og tað kann merkja, at fólk verður tikið aftur av miðvøllinum.

Men hvussu er og ikki, so tykjast klaksvíkingar tó at hava gott mót. Nýstovnaða stuðulsfelagið sigst eisini ætla sær við til dystin, og tá KÍ eisini hevur eitt stuðlafelag við klaksvíkingum í Havn, er í øllum førum nógv, sum bendir á, at tað verður undirhalandi í Gundadali sunnudagin.



*Nógv bendir á, at talan verður um ein undirhaldandi sunnudag, tá B36 fer at taka ímóti KÍ*

## Lyklaspælarar eru leikbannaðir

**Í Runavík er spurningurin, um gøtumenn koma á vitjan fyri at leypa á ella fyri at verja og bíða**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*



Skal NSÍ aftur vera annar parturin í ólavsøkufinaluni, ella verður tað GÍ, sum skal á ólavsøku. Annað av Eysturoyar liðunum skal spæla ólavsøkudag, og hitt skal ikki. Í morgin verður fyrri parturin av lokaltalvinum í Eysturoy um finaluplássið. Dysturin verður í Runavík.

Heimaliðið er í hvussu so er eitt sindur og møguliga meiri enn eitt sindur skert. Óli Hansen hevur fingið trý gul kort í steypakappingini í ár og er tískil leikbannaður. Tað kemur illa við, tí tað hevur verið eitt sindur tunnligt við miðverjuspælarum hjá NSÍ í ár. Ein møguleiki er, at Kári Hansen verður fluttur aftur av miðvøllinum. Av persónligum orsøkum hevur Kári ikki vant tvær tær seinastu vikurnar, og tí er tað ivasamt, um hann yvirhøvur verður við í morgin.

Brynjolvur Nielsen hevur ikki vant í hesi vikuni. Hann hevur havt trupulleikar við lærinum, og lærtrupulleikar vóru eisini orsøk til, at Gert Langgaard hóskvøldið bara vandi eina lítla løtu. Í NSÍ vóna teir kortini, at teir báðir verða førir fyri at spæla í morgin.

Hjá GÍ er Poul Ennigarð framvegis skaddur, og Hans Pauli Petersen verður heldur ikki við í morgin. Hann er leikbannaður. Súni Olsen gavst at venja hóskvøldið, tí hann hevði trupulleikar í øðrum knænum. Í Gøtu vóna teir, at landsliðsmaðurin verður á liðnum í Runavík í morgin.

### Taktiska spælið

Tá ið talan er um fyrru av tveimum hálvfinalum er stóri spurningurin, hvussu uppleggið hjá venjarunum verður. Eingin ivi er í, at NSÍ liðið fer at gera alt fyri á heimavølli at vinna sær eina støðu, sum kann hava við sær, at teir undan seinna dystinum verða betri fyri enn mótstøðumenninir. Men um tað skal gerast við fullari ferð frameftir, ella um tað skal gerast við at bíða og vera tolnir, inntil møguleikin fyri snarálopi verður har, er ein annar spurningur.

GÍ venjarin, Kryztof Popczynski hevur so ofta tikið til, at liðið hjá honum er best til at leypa á. Tað eru mangir mátar at leypa á uppá, og tað skal neyvan roknast við, at GÍ í útgangsstøðuni í morgin fer at vera serliga álopskent. Tað fer at ráða um hjá gøtumonnum at varðveita bóltin, soleiðis at teir kunnu byrgja fyri, at mótstøðumenninir spæla seg til møguleikar. So ræður um at taka av, um Popczynski sjálvur ella Símun Samuelsen fáa høvi at royna seg ímóti Jens Martini Knudsen.

NSÍ og GÍ hava hittst tvær ferðir higartil í ár. Í venjingardysti í Runavík tíðliga í vár vann heimaliðið 2–1. Í Klaksvíkskappingini endaði dysturin 2–2, áðrenn GÍ vann eftir brotssparkskapping. Í landskappingini í fjør vann NSÍ báðar dystirnar. 3–2 í Runavík og 2–0 í Gøtu.